4.67 í eftirmeting | 99 % standa royndirnar



# Scrum Master Certified™

Skeiðið til tín, sum skal tryggja eina vælvirkandi Scrum-prosess.

Við einari Scrum Master-sertifisering kanst tú tryggja, at Scrum-toymið hevur optimalar arbeiðsumstøður í mun til at kunna lata eina verkætlan úr hondum.

## Hetta kemur tú at læra um

- Hvussu tú hugsar og arbeiðir í agilum verkætlanum
- Scrum-førleikarnar og hvussu tú brúkar tær
- Tín leiklut sum Scrum Master og leiklutirnar hjá hinum innan Scrum
- Øll amboðini, so tú kanst handfara og leiða eina Scrum-verkætlan
- Hvussu tú kanst hjálpa við at implementera Scrum á tínum arbeiðsplássi

## Fyritreytir

Tað er ikki neyðugt hjá tær at hava aðrar sertifiseringar fyri at luttaka á hesum Scrum Master Certified-skeiði.

## Skeiðið er ment til >>

Scrum Master Certified er til tín, sum skal coacha og minka um forðingar fyri menningartoymi, umframt at tryggja, at allar mannagongdir verða virdar (servant leadership).

## Lýsing av Scrum Master Certified™

Scrum er eitt eyðsýnt og smidligt leiðsluamboð, sum kann tillagast nógv fakøkir, mentanir og vinnugreinar. Alt er grundað á best practice og holla vitan. Rammuverkið hevur langt síðani prógvað sítt virði. Scrum er heimsins mest útbreiddi háttur til smidliga verkætlanarleiðslu og framleiðslustýring. Í ítróttinum verður Scrum nýtt at fáa gongd á aftur bóltin, tá alt er steðgað upp. Hiðani stavar navnið Scrum. Scrum verður serliga brúkt til verkætlanir, har tað er torført at meta um, hvat fer at henda, og har lýsingin av produktinum og krøvini til tað javnan broytast.

Ein Scrum Master vegleiðir, fasiliterar og undirvísir øllum luttakarum í verkætlanini. Scrum Master beinir fyri forðingum hjá liðinum og tryggjar, at allar Scrum-mannagongdir vera fylgdar.

## Endamálið við skeiðinum

Tá tú hevur tikið skeiðið, ert tú før/ur fyri at virka sum Scrum Master í professionellum sambandi.

# Undirvísingarháttur

Okkara Scrum Master-skeið er sjálvlestur við video-e-læring. Undirvísingina skalt tú stroyma, og tú gert sjálv/ur av hvar og nær. Tú stýrir eisini sjálv/ur, hvussu skjótt tú vilt taka skeiðið. Tú fært góðan stuðul bæði undir og aftan á skeiðið við einari samanseting av spurningum (quiz), sjónfílum og stuðlandi tilfari og royndarprovtøkum.

# Um undirvísaran

Jesper Hansen, akkrediteraður undirvísari í Scrum™

Jesper er eksternt sertifiseraður innan Scrum™, PRINCE2®, MSP®, AgilePM® og IMPA. Harumframt er hann sertifiseraður verkætlanarleiðari hjá General Electric og Capgemini. Hann hevur 18 ára royndir við fulltíðar programm- og verkætlanarleiðslu í fleiri ymiskum vinnugreinum; eitt nú trygging, lív og pensión, tí almenna, instrumentmenning, fígging og produktmenning. Hann undirvísir serliga í Scrum™ og AgilePM®.

# Íroknað skeiðið

- 4 videotímar
- 55 ískoytistilfar
- 14 testir
- 20 tímar | Lestrartíð tilsamans
- 12 mðr. | Atgongd
- Kann gjøgnumførast á teldu, teldli ella fartelefon
- Online próvtøka
- Official Scrum-vegleiðing
- Prógv upp á sertifisering
- 2 próvtøkuroyndir

# Sí alt um skeiðsinnihaldið á niðanfyristandandi síðum.

Hevur tú spurningar um skeiðið, ert tú altíð vælkomin at venda tær til okkara.

Vinarliga
Synergi

Åsa Andreasen
227464 | asa@synergi.fo

# Skeiðsinnihald: Scrum Master Certified™

**Her sært tú eitt yvirlit yvir, hvussu skeiðið er bygt upp >>**

## Agile og Scrum – yvirlit | 5 sjónfílur – 72 min.

Fyrst fara vit at greiða frá, hvat Agile er, og hvat tað merkir at vera "adaptiv". Tað eru nógv orð innan "Agile", eitt nú: Agile Methodology, Scrum, Agile Teams, Agile Approach o.o.

### Innleiðsla
Vit gjøgnumganga grundreglurnar og úrtøkuna av skeiðnum, ymiskar málsetningar og koma við einari lýsing av teimum læringsháttunum, sum vit nýta á skeiðinum. Tú fært eisini kunning um, hvussu próvtøkan gongur fyri seg. Um tú vilt vita meiri um próvtøkuna, kanst tú lesa víðari niðanfyri.

### Agile yvirlit
Agilitetur snýr seg um evnini at reagera og levera broytingar, sum hækka produktivitetin í einum avbjóðandi arbeiðsumhvørvi.

### Agile manifest
Í tí agila manifestinum verður grundhugsanin um at arbeiða agilt lýst. Grundhugsanin verður gjøgnumgingin grein fyri grein.

### Agilar metodur
Tær agilu metodurnar vórðu ikki mentar eftir einum degi. Verkætlanir við "vandfaldsmodellen" hava ofta víst seg ikki at røkka á mál, og tí vera agilu metodurnar brúktar, tí adaptiv verkætlanarleiðsla gevur størri smidleika, betri dynamikk og møguleikar fyri, at tú kanst reagera upp á broytingar á ein nýggjan og øðrvísi hátt.

### Scrum yvirlit
Heimsins best dámda agila metoda er Scrum. Í hesum brotinum fært tú yvirlit yvir teir ymisku partarnar, sum eru samansettir av 6 høvuðsreglum (principper), 19 tilgongdum (processer) og 6 sjónarhornum (aspekter).

### Scrum leiklutir
Tá vit tosa um "Core Roles", tosa vit um lyklaleiklutir. Tað øvuta er "Non Core Roles", sum svara til interessentarnar í einari verkætlan. Um ein Scrum-verkætlan skal eydnast, hevur tað – sum í øllum øðrum verkætlanum – týdning, at tú megnar at handfara interessentarnar í verkætlanini. Tað er eitt evni, sum ofta er undirmett – eisini í Scrum. Tí verður mælt til eisini at gera eina veruliga interessentgreining í Scrum-verkætlanum.

### Product Owner
Ein "Core Role" er t.d. Product Owner, sum er tann, sum tekur avgerðirnar í verkætlanini. Hesin persónurin verður eisini ofta róptur **"Voice of the Customer".**

### Scrum Master
Ein annar "Core Role" er Scrum Master, sum stavar frá hugmyndini um ein "Servant Role". Scrum Master er sostatt eitt slag av tænara hjá hinum Scrum-luttakarunum.

### Scrum Team
Ein triði leiklutur er Scrum Team, sum hevur ábyrgdina av, at krøvini til verkætlanina eru skilt og latin Product Owner eftir avtalu. Í Scrum-verkætlanum er hetta toymið "self-organized".

### Non-core Roles
“Non-core Roles” eru teir leiklutirnir, sum ikki hava nakað samband við dagliga raksturin, men kortini hava ein týðandi leiklut í mun til agilu verkætlanina. “Non-core Roles” eru til dømis: stuðlar, veitarar, kundar, brúkarar og Scrum Guidance Body.

## Scrum-stig | 20 sjónfílur – 64 min.

Stigini í Scrum minna nógv um tey, sum vit kenna frá vanligum verkætlanum. Munurin er, at øll stigini vera gjøgnumførd í mun til eitt einstakt “sprint”, sum vanliga tekur 2-4 vikur.

Í høvuðsheitum merkir hetta, at vøran skal vera klár relativt aftan á hvørt sprintið. Soleiðis koma allar prosessirnar í spæl, og integratiónspunktini verða roynd í mun til veruligu støðuna. Tí verða vandar og trupulleikar eyðmerktir í byrjanini av verkætlanini, og hetta sparir nógva virðismikla tíð og nógvan pening.

### Initiate
Initiate Phase er fyrsta stigið í einari Scrum-verkætlan. Her eru hesar prosessirnar umboðaðar: Identify Scrum Master, Develop Epic(s), Create Project Vision, Create Product Backlog, Identify stakeholders, Conduct Release Planning og Form Scrum Team.

### Plan and Estimate
Í næsta stigi tekur Scrum-toymið lut í hesum prosessum: Estimate, approve, create and commit user stories, Estimate and create tasks og Create the Sprint Backlog.

### Implement
Í implementeringini verða uppgávur gjørdar, sum hava til endamáls at levera ætlaðu vørurnar. Her eru hesi stigini: Conduction Daily Standup Meeting, Groom Prioritized Product Backlog og Creation Deliverables.

### Review and Retrospect
Hetta stigið er um at skapa eitt yvirlit yvir veitingar í mun til kundan, men eisini í mun til toymið. At hyggja eftir tí, tit hava lært, er ein týðandi partur av tí agila hugsunarháttinum. Á hesum stiginum verður arbeitt við hesum prosessum: Demonstrate and validate Sprint, Retrospect Sprint og Convene Scrum of Scrums.

### Release
Á síðsta stigi seta vit fokus á, at vøran verður latin og góðkend av kundanum. Millum annað skal dokumentatiónin upp á pláss; hvat vita vit, og hvat hava vit lært, so vit kunnu nýta hetta í einari nýggjari agilari verkætlan. Her arbeiða vit við: Retrospect Project og Ship Deliverables.

## Skalering av Scrum | 2 sjónfílur – 26 min.

Nógv halda, at Scrum bara kann nýtast í smáum og einføldum verkætlanum. Har fara tey skeiv. Scrum kann lættliga tillagast í mun til stórar verkætlanir ella onnur programm.

### Skifti til Scrum
Av tí at Scrum hugsar so øðrvísi um verkætlanir, er tað sera áhugavert at kanna, hvat tú kanst gera fyri at koma í gongd. Her kanst tú velja millum Top Down ella Bottom Up.

# Testa teg sjálva/n

Á okkara Scrum Master-skeiði eru testirnar á enskum, tí próvtøkan gongur fyri seg á enskum. Áðrenn tú fert upp til sjálva próvtøkuna, kanst tú testa teg. Hetta eru ískoytistestir, sum eru at meta sum próvtøkuvenjingar.

# Case Study

### Uppgáva 1: Ger eina verkætlanarvisión

Við grundarlagi í døminum "VMfoods" skalt tú gera eina verkætlanarvisión. Tá tú hevur givið títt boð, sært tú boðini hjá øðrum skeiðsluttakarum. Endamálið er, at tú sjálv/ur skalt vera før/ur fyri at skapa eina visión út frá vitanini, sum tú fært í sambandi við uppgávuna.

### Uppgáva 2: Ger eina fyribils vøruskrá

Fyri at loysa hesa uppgávu skalt tú taka niður fyribils vøru-backlog í brotinum um "Materialer". Í listanum sært tú dømir upp á "Epics". Tín uppgáva er at gera 5 nýggj "Epics". Tann einasta kunningin, tú hevur, er sjálv uppgávan. Endamálið er, at tú skalt kunna eyðmerkja og menna Epics.

# Mál

Scrum Master Certified-próvtøkan er á enskum, men undirvísingin er á donskum – ella enskum. Tú velur sjálv/ur.

# Hvussu gongur próvtøkan fyri seg?

Próvtøkan er online, og tú bíleggur sjálv/ur dag og tíð. Próvtøkan er undir eftirliti, og á próvtøkudegnum verður tú vegleidd/ur gjøgnum próvtøkuna.

### Krøv til onlinepróvtøkuformin

- vevmyndatól (rúmið skal kannast áðrenn próvtøkuna, og tí skalt tú hava ein spegil, um tú hevur innbygt vevmyndatól)
- mikrofon
- møguleiki at sita sjálv/ur í einum høli undir allari próvtøkuni

Próvtøkan kann takast í hølunum hjá Synergi, eftir nærri avtalu.

Spurningar ella ivamál?

So ring ella skriva endliga til okkara.

Vinarliga
Synergi

Ása Andreasen
227464 | asa@synergi.fo